# Nøvn

## Føðingar



*11. mars fekk Emma ein fittan lítlabeiggja. Hann vigaði 3509 gr og var 55 cm langur. Foreldrini eru Gudny Langgaard og Ved Nagurset, Leirvík.*

---

8. mars fingu Joan Midjord Joensen og Debes Sivertsen, Klaksvík, ein son. Hann var 47 cm langur og vigaði 2185 gr.

10. mars fingu Kristina á Løgmansbø og Gunnar Gaardbo Poulsen, Argjum, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3320 gr.

13. mars fingu Edith Marnersdóttir og Pætur Rein Jensen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3700 gr.

14. mars fingu Margit Bjørklund Nielsen og Jóhan Ziskason, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3545 gr.

17. mars fingu Fríðunn & Jari Mellemgaard, Hvalba, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4125 gr.

## *Neystarequiem*

Tey standa so svinn øll har lið um lið
og minnst á tíðina stóru,
tá eingin var dagur, sum gav teimum frið,
og bátar um lunnarnar fóru.

Nú standa tey fúnað og húka so dánt,
so ymisk í skapi og burði,
sum ei hevur nakað frá øðrum lánt
av sermerktum arkitekturi.

Ja, neystini vart hava bátin á lunn,
so hann frískur á flot kundi fara
at finna sær ýti til plink og til grunn
og føra sín fong heim til garða.

Her gingu í fyrndini seigligir menn,
ein meldur av góðum lívi;
teir livdu og sótu á miði í senn
at veiða til barnið og vívið.

Teir sótu her ofta við pípu í nev
á støðni har súgurin dregur,
og kannaðu himin og havsins stev
og vandaðu vánir og veður.

Ein roykur av viði og tjøru í senn,
tá ið borðrivur tettast skuldu,
ein vond av dúki og hegnigir menn
sum vandaligt lekarnar huldu.

Ein deymur av línu og agnaslav
og rotnandi kræklingaøgnum,
ein slipa sum fjørukyktunum gav
ein alheim við livandi gøgnum.
----
Her sást tú teir gomlu um tvørtræið hvíla
á ørmum sum giktpíndir lógu á kross
ímeðan í munni teir skrá mundu míla
við biti og brái av strevi og knoss.



Nú stóðu teir bara við friði í sinni
og slotaðu aftur á lívsins lag
við snørinum drignum og loddinum inni
og lippunum taldum til evsta dag.
----
Nú drigið teir hava for síðstu ferð
teirra bátar í neystini niðan,
og kirkjan teim seinastu veiðina ber
og ýtar teim himmalska liðan.

**pmp**

**Jóhannes M. Solmunde**
**Søldafjørður**
**vanliga nevndur Jóhannes í Byrgi**

andaðist á Landssjúkrahúsinum 14. mars.

Kistan fer úr kapellinum á
Landssjúkrahúsinum fríggjadagin kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Elim í Søldafirði
leygardagin kl. 14.00.

**Marjon, Paula og Páll v/ familju**

Tey, ið ynskja at senda blómur ella krans, kunna í staðin lata eina gávu til Elim í Søldafirði, konta í peningastovninum.

**TØKK**

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og
hjálpsemi, tá kæra mamma, vermamma,
omma og langomma okkara

**Paulina Midjord**

doyði og varð jarðað.

Takk til Hanus a Gørðum fyri troystarík
orð í kapellinum, kirkjuni og á grøvini.
Takk til urguspælara, kirkjutænara,
sangarar og gravara.
Takk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt
hjálptu til við jarðarferðina og ervið.
Takk fyri blómur og peningagávur til
Eldrasambýlið í Bøgøtu.
Takk til starvsfólk á deild M á Klaksvíkar
sjúkrahúsi, sum vóru um hana teir
síðstu dagarnir í lívi hennara.
Ein serstøk takk til starvsfólk á
Eldrasambýlinum á Bøgøtu, sum hava
verið um Paulinu tey síðstu árini.

***Familjunnar vegna***
**Eli og Álsy**



**TØKK**

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu, umsorgan og
hjálpsemi, tá okkara elskaða dóttir og systir

**Hildigunn Petursdóttir Simonsen**

doyði og varð jarðað.

Tøkk til starvsfólkini á Team 3
og til Berg Jacobsen, prest.
Tøkk til gravara, urgulspælara
og Jens Marna fyri sangin.
Tøkk til Hanus á Gørðum, prest, fyri troystarík orð.
Ein serstøk tøkk til tín Nina, takk fyri alt.
Tøkk til tykkum, ið hjálptu til á einhvønn hátt.
Tøkk til øll tykkum, sum fylgdu Hildigunn til
hennara seinasta hvíldarstað.
Somuleiðis tøkk til øll tykkum,
sum góvu eina peningagávu til
Felagið fyri Pinkubarnadeyða.

***Familjunnar vegna***
**Sonja, Petur, Rani og Katrina**